# Skrivstovunæmingur

## …sært tú møguleikarnar?



Tórshavnar kommuna er eitt stórt og gott arbeiðspláss, og vit leggja stóran dent á, at tú, sum næmingur hjá okkum, verður ein partur av einum jaligum arbeiðsplássi við góðum trivnaði, har tann einstaki fær álit, ábyrgd og ávirkan.

Handaligi parturin av útbúgvingini fer fram í miðfyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu, har tú luttekur í fjølbroyttum uppgávum m.a. á snarskivuni, starvsfólkadeildini og roknskapardeildini. Tú lærir at nýta allar hentleikar, sum hoyra til nútímans skrivstovu, t.d. kundaavgreiðslu, elektroniska journal, lønar- og roknskaparskipanir, elektroniskar peningaflytingar, umframt vanlig skrivstovu-forrit.

Lærutíðin er vanliga 2 ár, men tað veldst um hvørja útbúgving tú hevur.

Skúlagongdin er fýra tíðarskeið í Danmark, tilsamans 13 vikur. Hetta vanliga á Niels Brock í Keypmannahavn.

**Førleiki**
Dentur verður lagdur á, at viðkomandi er blíður og fyrikomandi, og tað krevst, at umsøkjari hevur miðnámsprógv.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðs-gevarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, deildarleiðara, (janus@torshavn.fo), ella Ebbu Vilhelm, (ebbav@torshavn.fo), telefon 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um út-búgving og royndir, skal vera hjá Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í sein-asta lagi mikudagin 10. desember 2008 kl. 12.00. Merkið umsóknina »Skrivstovunæmingur«.

**Tórshavnar kommuna**



# Leiðari til Svimjihøllina

Søkt verður eftir leiðara til Svimjihøllina í Gundadali.

**Svimjihøllin í Gundadali**
læt upp í 1982. Høllin hevur fýra hyljar, tveir barnahyljar, ein 25 metra hyl og ein kavingarhyl, umframt gosbað, hitarúm og sólir. Í høllini er kaffistova, sum er opin, tá almenn svimjing er. Talið á vitjandi er í miðal 450-500 um dagin, tó munandi fleiri um summarið, tá høllin er opin allan dagin, millum 650 og 800 fólk. Árliga hevur høllin eini 150.000 vitjandi. Í svimjihøllini eru 12 fólk í føstum starvi og átta fólk í føstum avloysarastarvi, og í kaffistovuni arbeiða tvey fólk.

Kommunan bjóðar eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum, har møguleiki er at skapa nýggj tilboð til viðskiftafólk í høllini.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:**

- at standa fyri øllum rakstri av svimjihøllini og viðlíka-haldi innan og uttan
- at hava ábyrgd av dagliga virkseminum, m.a. mót-vegis starvsfólkum og viðskiftafólkum, tekniskt og fíggjarliga
- at tryggja eitt trygt, reint og dámligt umhvørvi í svimjihøllini
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**Førleikakrøv**

- Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og kunnleika til økið. Teknisk útbúgving og/ella hóskandi royndir/vitan kann geva fyrimun, vísandi til at nógv teknisk útgerð og skipanir eru í svimjihøllini
- Royndir innan leiðslu og samstarv

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi er fyrikomandi og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis, og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið í høllini og kunna ganga á odda.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Leiðarin í Svimjihøllini hevur tilvísing til mentamálaleiðaran.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, menta-málaleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 15. desember 2008.

**Tórshavnar kommuna**